UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Umhugsa vindmyllur

Norsk Hydro umhugsar at seta ein hóp av vindmyllum í Gursken í Sunnmøre.

Felagið hevur seinastu árini gjørt nakrar vindmátingar í økinum, og Svein Solhjell, deildarleiðari sigur við blaðið Sunnmøreposten, at kanningarúrslitini eru góð, og at felagið tí fer at halda fram við kanningunum.

Norsk Hydro er í ferð við at seta 16 vindmyllur norðan fyri Hammerfest. Tær kosta umleið 320 milliónir norskar krónur og kunnu geva 40 megawatt ella nóg mikið til 4000 húsarhald. Sambært Svein Solhjell verða vindmyllurnar í Sunnmøre á leið líka nógvar, verður verkætlanin veruleiki.

## Dýrari bilar

Ein reglugerð, sum ES fer at seta í gildi í seinasta lagi tann 1. oktober í ár, fer at bera í sær, at tað verður dýrari at keypa nýggjan bil í Danmark. Donsku innflytararnir vænta, at ein persónbilur, sum í dag kostar 200.000 krónur, verður umleið 20.000 krónur dýrari sambært næggju reglugerðini.

Tann nýggja reglugerðin ber samstundis í sær, at eykalutir til bilar verða bíligari. Higartil hava donsku innflytararnir fingið bilarnar bíligari enn innflytararnir í hinum ES-londunum, tí donsku avgjøldini eru so høg, men tann fyrimunin missa innflytararnir nú. Sostatt verður tað dýrari hjá dønum at keypa sær nýggjan bil, men bíligari at umvæla tann gamla.

## Lítil vøkstur

Vøksturin í týska búskapinum var lítil í fjør. Sambært almennu hagtølunum var hann 0,6 prosent, og tað er lítið samanborið við árið fyri, tá hann var trý prosent.

Hagtølini vísa eisini, at týski útflutningurin vaks 5,1 prosent í fjør samanborið við heili 13,2 prosent í 2000.

# Ivi um fangarnar í Guantanamo



*Taliban og Al Qaeda-fangar á veg til amerikansku Guantanamo herstøðina á Kuba hósdagin. 110 fangar eru úr Afganistan eru nú á herstøðini*

*Mynd: Reuters*

**Ósemja er um, hvørja støðu teir afghansku fangarnir á amerikansku herstøðini Guantanamo á Kuba hava. Fleiri altjóða felagsskapir hava mótmælt viðferðini, fangarnir fáa**

*Árni Joensen*

ST-mannarættindakommiserurin, Mary Robinson, er ógvuliga greið í sínari talu, tá tað snýr seg um fangarnar í Guantanamo. Hon sigur, at teir eru krígsfangar og skulu viðfarast sum slíkir sambært teimum altjóða reglum, sum galda á tí økinum.

Bretska stjórnin sigur eisini, at menninir eru krígsfangar, og stjórnin í London hevur gjørt amerikanarunum greitt, at teir bretsku ríkisborgararnir, sum eru millum fangarnar, skulu flýggjast bretskum myndugleikum. Bretland hevur gjørt greitt, at landið góðtekur ikki, at amerikanarar møguliga fara at døma teir bretsku ríkisborgararnar til deyða. Sambært amerikanska verjumálaráðnum eru umleið 20 av teimum fangunum, sum higartil eru komnir til Kuba, bretskir ríkisborgarar.

### Løgfrøðiligt ongamannaland

Norski fólkarættarserfrøðingurin, Arne Willy Dahl, segði við norska blaðið Aftenposten í gjár, at tað er trupult at avgera, hvat slag av fangum talan er um í hesum máli, men hann sigur seg bíða við spenningi eftir, hvussu amerikanska stjórnin ætlar at sleppa uttan um Genévesáttmálan um rættindini hjá krígsfangum.

Arne Willy Dahl sigur, at enn hava amerikanararnir ikki sagt beinleiðis, hvørjir fangarnir í Guantanamo eru.

- Vit mugu tó ganga út frá, at hetta eru menn, sum hava verið í afghanska herinum, og sum hava stríðs ímóti amerikanarunum, og tá hevur tað minni at siga, um menninir eru afghanar, pakistanar, arabarar ella bretar, sigur Arne Willy Dahl.

Hann sigur seg ivast í, at nakar av monnunum kann skrásetast sum leiguhermaður, tí tað er einki, sum bendir á, at menninir hava virkað hermenn við fíggjarligum vinningi fyri eyga, sigur hann.

Norski fólkarættarserfrøðingurin ásannar, at málið er eitt sindur fløktari, um talan er um menn úr Al-Qaeda, og at vit tá nærkast einum løgfrøðiligum ongamannalandi.

- USA kann uppfata al-Qaeda sum ein yvirgangsfelagsskap, sum skipaði fyri atsóknunum tann 11. september í fjør, og sum brýtur allar reglur og siðvanar í kríggi. Men er hetta amerikanska uppfatanin, tá átti tað at verið løgreglan og ikki hervaldið, sum tók menninar. Hervaldið kundi kanska hjálpt løgregluni, sigur Arne Willy Dahl.

Hann heldur, at USA tulkar málið soleiðis, at landið hevði rætt til hernaðarligt mótálop við at kalla fangarnar "lógleysar krígsmenn". Sjálvur heldur norski serfrøðingurin, at tað hevði verið rættari at kalla teir "ikki-lógligar stríðsmenn".

### Sum aðrir fangar

Spurdur beinleiðis, um menninir eiga at verða roknaðir sum krígsfangar, svarar Arne Willy Dahl:

- Teir eru í hvussu er fangar, og USA hevur rætt til at taka teir, um afghanska stjórnin hevur givið amerikanarunum loyvi til tess. Og enn hava vit ikki hoyrt nakað mótmæli frá stjórnini í Kabul. Harafturat hevur USA fullan rætt til at flyta menninar til Guantanamo, sum herstøðin er undir amerikanskum lóggávuvaldi, hóast hon er á Kuba.

Arne Willy Dahl leggur afturat, at tá amerikanarar hava valt at flyta fangarnar úr Afghanistan, má tað vera tí, at amerikanarar ætla at leggja revsimál ímóti teimum. Gera teir tað, hava fangarnir somu rættindi sum onnur álærd. Verða teir dømdir til deyða, skulu amerikansku myndugleikarnir kunna myndugleikarnar í londunum, haðani fangarnir eru, um deyðadómin, og ávísar reglur eru fyri, nær deyðadómurin kann fremjast í verki, sigur norski fólkarættarserfrøðingurin.

Úr Norðurlondum:

## Ja til kjarnorku

Finska stjórnin hevur samtykt at byggja eitt kjarnorkuverk afturat teimum fýra, sum landið hevur frammanundan. Tíggju ráðharrar atkvøddu fyri uppskotinum, meðan seks atkvøddu ímóti.

Málið um tað fimta kjarnorkuverkið er eitt sera eymt politiskt mál, og tað er ikki óhugsandi, at avgerðin hjá stjórnini kann gera enda á stjórnarsamgonguni. Tey Grønu, sum eru í samgonguni, hava boðað frá, at flokkurin fer at endurskoða samgongusamstarvið seinni í ár. Flokkurin er harðliga ímóti at byggja fleiri kjarnorkuverk.

## Tunnil til kol

Felagið Store Nordiske Kulkompani, sum rekur kolanámsvinnu á Svalbard, umhugsar at gera ein tunnil fyri at stytta flutningsleiðina frá náminum til avskipingarhavnina. Vegurin, sum nú verður n˝ttur, er 15 kilometrar langur.

Felagið hevur roknað út, at tað fer at kosta einar 175 milliónir norskar krónur at bora tunnilin. Harafturat kemur flutningsbandið til kolið, og tað verður mett at kosta einar 85 milliónir krónur.

Umleið 1,2 milliónir tons av koli koma árliga úr Svea Nord-náminum á Svalbard.

## Missir heitið

Norska kongshúsið hevur boðað frá, at Märtha Louisa prinsessa missir heitið Hennara Kongaliga Hátign tann 1. februar. Sjálv sigur prinsessan, at hetta verður gjørt, so hon verður meiri óheft, tí hon ætlar at stovna sína egnu fyritøku og at forvinna sínar egnu pengar. Tað er best fyri allar partar, sigur hon.



Jens Pauli Petersen, virkisleiðari, førir hagtøl:

# Miðalvektin á upsa minkaði eitt pund í 2001

**- At nógvur smáur upsi er í fiskiskapinum, man væl merkja, at góður árgangur er á veg. Men spurningurin er, hvar tann stóri fiskurin er, sigur virkisleiðarin**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*

Fiskimenn vita nógv um fisk og fiskiskap. Tískil verður ofta spurt, hví ikki verður lurtað meira eftir teimum, tá ið ásetingar skulu gerast og lógir og kunngerðir broytast. Hvussu kunnu landkrabbar vita alt um fisk, tá ið teir nóg illa hava sæð ein livandi fisk?

Tað var løgtingsmaðurin, Juul Jacobsen, sáli, sum í eini valsending umrøddi henda spurningin. Hann helt, at nógvir av teimum, sum gera seg klókar uppá fisk og fiskiskap, nóg illa hava sæð ein livandi murt – og so tók hann, so skemtiligur hann kundi vera, afturí aftur og segði: "Jú, kanska sín egna!"

Eyðvitað er, at fiskimenn, sum hava siglt í nógv ár, vita ein heilan hóp. Trupulleikin er, at teir hava smáar møguleikar at føra hagtøl yvir tað, teir síggja og uppliva á sjónum. Tí kann vera torført hjá teimum at prógva sína vitan við tølum.

### Upsin nógv smærri

Ein, sum hevur ført hagtøl yvir støddina á upsa, er virkisleiðarin á Fiskavirking í Vestmanna, Jens Pauli Petersen. Talan er ikki bara um stakroyndir, men um allan upsan, sum virkið keypti í fjør, og tað er sjálvsagt eitt ótal.

Jens Pauli sigur, at miðalvektin á upsa í tíðarskeiðinum, 1. januar til 31. juni 2001 var 2,31 kg. Men í tíðarskeiðinum, 1. juli til 31. desember var miðalvektin bert 1,81 kg. Hetta merkir, at hvør upsi, sum Fiskavirking í Vestmanna keypti seinna hálvár í fjør, vigaði hálvt kg. minni enn í fyrra hálvári.

Tá ið Sosialurin tosaði við virkisleiðaran, hevði hann ikki tølini við hondina, men helt seg minnast, at miðalvektin á upsa alt árið 2000 var 2,3 kg.

### Dýrari framleiðsla

Maskinurnar spyrja ikki eftir, hvussu stórur ella lítil fiskurin er. Tær skera eitt ávíst tal av fiski. Er fiskurin smáur, minkar framleiðslan. Tískil er dýrari at framleiða smáan fisk enn stóran fisk. Jens Pauli vísir á, at framleiðslunøgdin er nær tengd at miðalvektini á fiskinum.

Spurdur, um hann hevur eina meting av, hvat tað merkir, at upsin er so smáur, sigur virkisleiðarin:

- Nei, tað havi eg ikki, og eg havi heldur ikki spurt meg fyri. Men tað, at nógvur smáur upsi er í fiskiskapinum, man væl merkja, at góður árgangur er á veg. Spurningurin er so bara, hvar tann stóri fiskurin er.

Jens Pauli sigur, at í summum førum koma skip við eini heilari last, har allur upsin er smáur, og har eingin stórur fiskur er ímillum.

### Góður upsi í ár

- Men tað, sum vit hava keypt higartil í ár, er alt miðalgóður upsi, sum eg vil meta liggur um eini 2,3 kg. í miðal.

Jens Pauli er tó vitandi um, at fiskurin, sum skipini hava fingið í januar, í nógvum førum hevur verið smáur, og hann væntar ikki, at miðalvektin hjá teimum, sum árið líður, verður so høg.

- Eg havi skilt, at slagið hevur verið betri sunnanfyri, eitt nú á Munkagrunninum, enn eystanfyri og innari vestanfyri, sigur virkisleiðarin at enda.

Jens Pauli Petersen hevur verið virkisleiðari á Fiskavirking í Vestmanna í trý ár.



*- Maskinurnar spyrja ikki eftir, hvussu stórur ella lítil fiskurin er. Tær skera eitt ávíst tal av fiski, og er fiskurin smáur, minkar framleiðslan. Tískil verður dýrari at framleiða smáan fisk enn stóran fisk, sigur Jens Pauli Petersen, virkisleiðari á Fiskavirking í Vestmanna*

# Brandur blæsur á heimavølli

**Fløguætlanirnar við Brandi Enni tykjast ganga væl. Nógvar upptøkur eru gjørdar í Havn, í Klaksvík og í Danmark. Men eisini í heimbygdini hjá Brandi, Tvøroyri, verður partur av tilfarinum framleiddur og herfyri sang Brandur í upptøkuhølum har, umframt at hann spældi horn**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*

Gongst eftir ætlan, so verður nýggja fløgan við Brandi Enni at síggja á handilshillunum nakað skjótt. Nógvir góðir tónleikarar og sangskrivarar hava verið við í hesi ætlan, sum Studio Pegasus stendur fyri.

Brandur gjørdi fyrstu ferð vart við seg sum sangara, tá hann sang á fløguni Mánadags Mortan og síðani kom hann upp í liðið av Kulum Rótum í Klaksvík og hann hevur prógvað, at hann er framúr sangari.

Men hann er eisini horntónleikari. Og í heimbygdini Tvøroyri hevur hann - hóast sín unga aldur - í fleiri ár verið partur av Tvøroyrar Hornorkestri, eins og restin av familjuni.

### Á heimavølli

Brandur hevur ferðast nógv, nú upptøkur hava farið fram til nýggju fløguna. Mong av bestu høvdunum innan føroyskan tónleik hava gjørt sítt til, at fløgan gerst veruleiki og upptøkur eru farnar fram í Klaksvík, í Havn og í Danmark.

Men ein partur av framleiðsluni, ið ætlandi skal við á fløguna, fer fram á heimavølli. Brandur hevur í vikuni verið í upptøkuhølum á Tvøroyri. Og umframt at syngja, so hevur hann eisini leikt bæði trompet og cornett á hesum upptøkum, tí hann er stinnur hornleikari.

Um vikuskiftið fara upptøkur til fløguna fram í Danmark.



*Umframt at vera kendur sangari, er Brandur Enni eisini gamal í garði sum horntónleikari*